## HEILSANIR



**Heidi 30 ár**
Her ert tú 25 ár og lekkrari. Tað er ikki øllum beskorið at síggja betur út við árunum.



**Heidi 30 ár**
Her ert tú 20 ár og lekkur.



**Góði Rógvi**
Hjartaliga tillukku við 18 ára degnum í dag. Vónandi gongur tað væl við koyringini. Eisini ein heilsan til Sonju við degnum 11/10 ynskja
**vit trý í Klinkby**



**Góði Jens Pauli!**
Her stendur tú í postklæðunum hjá Rubek. Tillukku við teim 40.
**Heilsan mamma**



**Góða mamma, vermamma og omma**
Hjartaliga tillukku við 81 ára degnum 22. okt. Her málar tú við okkum seinasta summar. Títt arbeiði liggur ikki eftir, røsk ert tú. Takk fyri alt tú ert fyri okkum.
**Vit á Brekku 17**



**Góða Ingibjørg**
Hjartaliga tillukku við degnum 19/10. Takk fyri vitjanina í Danmark.
**Heilsan Rannvá**



**Góða Ingibjørg**
Tað er ikki oftari enn so, at man sær eitt sovorðið bílæt av tær. Tillukku við degnum ynskja
**hinar í nonnuklubbanum**



**Góða Ingibjørg**
Tillukku við degnum 19/10. Takk fyri ein super góðan skíðtúr í Frankaríki. Vónandi møtast vit uppi í Alpunum í viku 3.
**Heilsan bumsurin**



**Halló, tit báðar**
Her eru tit troyttar eftir ein góðan men strævnan túr uppi í Alpunum. Hav tað gott á jólum, hvar tit enn verða. Ingibjørg, tillukku við degnum.
**Heilsan vinirnir**



**Góða Ingibjørg**
Hjartaliga tillukku við degnum tann 19/10. Góðan túr, hvar enn tú endar. Vit gleða okkum at fáa teg sum skíðguide.
**Heilsan ein vinur**



**Góða Ingibjørg**
Hjartaliga tillukku við degnum 19/10. Takk fyri alt tú ert fyri meg. Góðan túr til Spania.
**Heilsan Høgni**



**Góði abbin**
Hjartaliga tillukku við 75 ára degnum 22. okt. Bestu ynski frá
**Reidar og Rebekku**



**Góði Rógvi**
Tillukku við 18 ára degnum í dag. Tað verður gott at fáa koyrikortið. Vit ynskja tær alt tað besta og Guds ríku signing.
**Vit 5 á Høgabóli**



## HEILSANIR



Við hesari heilsan takka vit hjartaliga øllum tykkum, ið gleddu okkum á brúdleypsdegi okkara 22. juli 2000. Tøkk fyri gávur, fjarrit, blómur, heilsanir og alla hjálpina, vit fingu.
**Eydna og John**



Øllum tykkum, sum við gávum, telegrammum og á annan hátt gleddu okkum á hjúnabandsdegnum tann 8. juli, takka vit hjartaliga.
**Svanna og Dias**



Hjartaliga takka vit øllum, sum á ymiskan hátt gleddu okkum á silvurbrúdleypsdegi okkara. Harrin signi tykkum øll.
**Dinna og Eyðun Jacobsen**



Hjartaliga takka vit øllum, sum gleddu okkum á hjúnabandsdegi okkara 2. august.
**Heilsan Tórun og Jan**



**Góði babba**
Hjartaliga tillukku við 24 ára degnum 22. okt. Mamma letur eisini heilsa. Vit elska teg.
**Heilsan mamma og eg**



**Góði Hans**
Hjartaliga tillukku við 5 ára degnum tann 24/10 ynskja
**omma og abbi í Havn**



Eg og foreldur míni takka hjartaliga tykkum øllum, ið gleddu okkum á konfirmatiónsdegi mínum sunnudagin 9. juli 2000.
**Símun**



**Góða, fitta Beinta**
Hjartaliga tillukku við tínum 4 ára føðingardegi 21. okt.
**Heilsan omma og abbi**



**Góða, fitta Andriása**
Hjartaliga tillukku við 12 ára degnum. Vit eru so góðar við teg. Alt tað besta í framtíðini ynskja
**Svanna og Súsanna**



**Heidi 30 ár**
30 ár og lekkrast. Tað verður øgiligt, tá tú verður 40.
**Gellurnar**

